Búskapur og vinna:

## Kuldi og larmur

Ein kanning av arbeiðsumstøðunum á norskum fiskavirkjum vísir, at umstøðurnar á flestu virkjunum eru vánaligar. 20 prosent av teimum spurdu kæra seg um, at tað er ov kalt á virkjunum, og heili 66 prosent siga, at larmurin er ov nógvur. Kanningin vísir eisini, at 55 prosent hava trupulleikar við rygginum og akslunum. Kanningin umfataði 1800 fólk á 118 fiskavirkjum.

## Atkvøða um evruna næsta ár

Fleiri bløð í Bretlandi vænta nú, at Tony Blair, forsætisráðharri fer at skriva út fólkaatkvøðu um evruna longu næsta ár. Tíðindini í bløðunum koma, eftir at forsætisráðharrin nú um dagarnar segði, at tað hevði greitt verið ein fyrimunur fyri Bretland at farið upp í felags evropeiska gjaldoyrasamstarvið.

Blaðið The Daily Telegraph skrivaði í gjár frá týðandi embætismonnum í stjórnini, at fólkaatkvøðan um evruna ella pundið ivaleyst verður í 2003.

## Krevja svenskan stjóra

Svenska stjórnin vil hava ein svia í ovastu leiðsluna í skandinaviska flogfelagnum SAS, eftir at svenski varastjórin, Maria Erhling, segði seg úr starvinum týsdagin. Avgerð hennara ber í sær, at nú sita tveir norðmenn og ein dani í ovastu leiðsluni í flogfelagnum.

Svenski vinnumálaráðharrin Bjørn Rosengren vísti í gjár á, at Svøríki er tann størsti eigarin í SAS, og at tað tí er rímiligt, at ein svii situr í ovastu leiðsluni undir liðini á aðalstjóranum. Donsk bløð tulka orðini hjá ráðharranum, sum at Svøríki kanska fer at krevja, at ein svii verður aðalstjóri ístaðin fyri verandi danska aðalstjóran Jørgen Lindegaard.

Svøríki eigur 21 prosent av partabrøvunum í SAS, meðan Danmark og Noreg eiga hvør síni 14 prosent.

**UTTAN ÚR HEIMI**

# Prestur viðgekk seg sekan og varð skotin

**Gølan um teir katólsku prestarnar í USA hevur fingið eina vend, eftir at ein prestur varð illa særdur av skotum, eftir at hann hevði játtað seg sekan**

USA

*Árni Joensen*

Ein av katólsku prestunum í USA, sum er lagdur undir at hava gjørt seg inn á børn og ung, varð týsdagin illa særdur av fleiri skotum. Tann 52 ára gamli presturin Maurice Blackwell var júst farin úr heimi sínum í Baltemore, tá ein ungur maður skjeyt hann.

Maðurin ringdi sjálvur til løgregluna stutt eftir og viðgekk, at hann hevði skotið prestin. Sambært løgregluni var talan um hevnd, tí maðurin vil vera við, at hann var ein av teimum mongu, sum presturin skal hava gjørt seg inn á.

Málið hevur vakt stóran ans í USA. Maurice Blackwell hevur leingi verið undir illgruna fyri at hava havt kynsligt samband við børn og ung. Ein rættur kannaði skuldsetingarnar og koma til ta niðurstøðu, at hald var í teimum flestu skuldsetingunum, og presturin varð tí loystur úr starvi. Men William Keeler, kardinalur valdi kortini at seta prestin aftur í starv. Kardinalurin vildi vera við, at hann kendi prestin betur enn tey, sum høvdu gjørt úrskurð um skuldsetingarnar ímóti honum.

Amerikanskir fjølmiðlar siga, at við tilburðinum í Baltimore hevur gølan um teir katólsku prestarnar fingið eina vend, sum eigur at bera í sær, at myndugleikarnir taka málið í munandi størri álvara enn higartil.



*Presturin Paul Shanley er her til avhoyringar í einum rætti í Boston. Hann er skuldsettur fyri at hava gjørt seg inn á ein hóp av børnum og ungum ta tíðina, hann var prestur í býnum*

# Aftur eitt fet til høgru

**Úrslitið av niðurlendska tjóðartingsvalinum var enn eitt vesturevropeiskt fet til høgru. Samstundis benda veljarakanningar í Fraklandi á somu gongd har**

NIÐURLOND

*Árni Joensen*

Teir stóru vinnarnir á tjóðartingsvalinum í Niðurlondum týsdagin vóru teir kristiligu demokratarnir og flokkurin hjá tí myrda politikaranum Pim Fortuyn. Kristiligu demokratarnir fingu 43 umboð í tjóðartingið, og flokkurin er nú tann størsti í Niðurlondum.

Undan valinum vístu veljarakanningar, at flokkurin hjá Pim Fortuyn fór at fáa einar 18 tinglimir, men tá upptalt varð týskvøldið, hevði hann fingið heili 26 tingumboð og gjørdist harvið tann næststørsti flokkurin.

Hjá arbeiðaraflokkinum var valið einki minni enn ein vanlukka. Flokkurin misti næstan helmingin av tingsessunum og hevur nú 23 tinglimir. Úrslitið var tað ringasta hjá flokkinum síðani seinna heimsbardaga, og Wim Kok, forsætisráðharri segði beinleiðis, at úrslitið var eitt slag í andlitið á flokkinum og sær sjálvum.

Tað er eingin ivi um, at teir kristiligu demokratarnir fara at skipa ta næstu niðurlendsku stjórnina, men enn er ógreitt, hvørjum flokkurin fer at skipa stjórn saman við. Talan verður tó helst um teir liberalu, men tað er ikki heilt óhugsandi, at flokkurin hjá Pim Fortuyn verður við í stjórnini.

### Eisini í Fraklandi

Í Fraklandi verður tjóðartingsval í summar, og eisini har benda veljarakanningarnar á, at høgravongurin fer at vinna. Ein kanning, sum varð almannakunngjørd í gjár, vísti, at høgraflokkarnir fara at fáa 41 prosent av atkvøðunum, og at vinstravongurin fær 39 prosent.

Tann víðgongdi høgraflokkurin Front National hjá Jean-Marie Le Pen fær sambært hesari kanningini 12 prosent.

Tjóðartingsvalið í Fraklandi verður í tann 9. og tann 16. juni.

Úr Norðurlondum:

## Nú verður tað

Fleiri donsk bløð halda, at danski almenningurin skjótt verður kunnaður um, at Fríðrikur krúnprinsur verður trúlovaður avstralsku kvinnuni Mary Donaldson. Donsk bløð hava leingi roynt at fáa eina mynd av teimum báðum saman á danskari jørð, og í gjár høvdu bæði BT, Ekstrabladet, Billedbladet og Se & Hør myndir av teimum báðum í einum bili uttan fyri Amalienborg.

Tey fýra bløðini eru á einum máli um, at krúnprinsurin og Mary Donaldson hildu seinasta vikuskiftið á einum slotti í Århus, og at tey m. a. vóru til handils í miðbýnum í Århus.

Kongshúsið vil ikki gera nakrar viðmerkingar til gitingarnar um, at tey bæði verða trúlovað í næstum.

## Smuglaðu sterkt

Svenska løgreglan hevur tikið tveir norðmenn, sum eru skuldsettir fyri at hava smuglað í minsta lagi 2000 litrar av sterkum. Løgreglan hevur lagt hald á teir 2000 litrarnar, og hildið verður, at menninir kundu fingið einar 400.000 krónur fyri teir.

Svenska løgreglan heldur, at menninir hava útvegað sær ta stóru nøgdina í Suðurevropa, og at teir ætlaðu at smugla tað ígjøgnum Svøríki til Noregs. Teir báðar seinastu mánaðarnar hava løgreglurnar í Svøríki og Noregi funnið ikki minni enn 10.000 litrar av rúsdrekka, sum menn hava roynt at smugla inn um norska markið.

## Neytaøði

Donsku landbúnaðarmyndugleikarnir hava aftur staðfest ein tilburð av neytaøði, hesaferð á Bornholm. Hetta er tann áttandi tilburðurin av neytaøði í Danmark seinastu tvey árini. Myndugleikarnir hava gjørt av at avbyrgja bóndagarðin á Bornholm, og øll neytini á garðinum verða dripin. Myndugleikarnir siga, at einki kjøt av sjúkum neytum er selt av garðinum.

# hygg & hoyr



**Frá fríggjadegi 17. mai til hósdagin 23. mai**

## »Borð um borð«




»Borð um Borð« er nýggj spurnarkapping, ið serliga snýr seg um hendingar og viðurskifti, ið hava við sjógvin at gera. Tað veri seg omanfyri einsvæl og undir vatnskorpuni - burturi og heima. Hugskotið til sendingina eigur Regin Patursson. Kappingin er skipað í fýra innleiðandi umfør, tvær semifinalur og eina finalu, tvs. sjey sendingar íalt. Hvør sending er býtt upp í fýra ymiskar kappingar. Harmonikumenn og áhoyrarar vera við til at seta dám á sendingarnar. Edward Fuglø hevur saman við framleiðslustjóranum Herleif Hammer gjørt leikpallin, ið ímyndar afturdekkið á einum ferðamannaskipi. Vertur er Leivur Hansen og dómari Marius Rein. Fyrsta sendingin kemur 2. hvítusunnudag kl. 20.

## Framhaldssøgur

Gamla Apotekið man vera mest vitjaða og mest umtalaða staðið hesa vikuna. Útvarpið hevur nærum hvønn tíma eina ella aðra viðmerking um tað, sum fer fram á politiska leikpallinum. Dagur og Vika roynir at fylgja tropp við ofta fleiri innsløgum í somu sending — ikki bara frá tí Gamla Apotekinum, men so sanniliga eisini frá tinghúsinum, sum broytist so merkiliga fyri hvørja vitjan.

Eitt er politiski vígvøllurin, beint í hølinum á hesum er annar vígvøllur, nevniliga verkfallið hjá navigatørunum, avleiðingarnar av hesum og afturvendandi og úrslitaleysar semingsroyndir.

Og so vóru tær aftur á skíggjanum! Hesar somu longu og troyttandi lýsingarnar fyri máling. Ótrúligt! Hvørt ár um somu tíð koma tær bak á bak – júst í sama líki sum árið fyri. Handilsfólk mistaka seg stórliga, um tey halda, at tey spara nøkur oyru við at senda somu lýsingina ár um ár. Tað er als eingin sparing, men ein útreiðsla til burturspilta senditíð! Heldur áttu hesi handilsfólkini at ráðført seg við Snilda Pætur – hann plagdi at vera hollur í ráðum!

Í Útvarpinum hava lýsingar eisini trokað seg fram at bestu senditíðini. Hvønn tann einasta dag beint undan tíðindunum á middegi og um nátturðatíð koma tær. Og so snildisligar eru tær, at tú situr við starandi eygum og opnum munni, meðan oyruni veittrandi royna at fanga orðini, sum hvørva í títtum hvínandi ljóðum ella grovligum drynjandi røddum. Løgið! Lítið annað er at siga um hesar lýsingar enn, at tær eru ótrúliga troyttandi og fjákutar! Eisini burturspiltir pengar, fyri ikki at siga: tápuligt oyðsl!!

Okkurt áhugavert hevur hóast alt verið hesa vikuna eisini. Stýrivolt er ofta áhugaverd og forvitnislig sending at lurta eftir. Hesuferð snúði hon seg um, hvørjar broytingar eru farnar fram á bókasøvnunum seinastu fáu árini. Tørvurin hjá brúkarunum setir øðrvísi krøv til starvsfólk og útgerð í hesum teldutíðum. Áhugavert var at frætta um tað arbeiðið, sum fer fram har, so tænastan kann nøkta tørvin.

Eg havi hug at nevna tvær sendingar, sum hava verið í Svf hesa vikuna. Tann fyrra var sendingin Mamma mín er ein persisk prinsessa. Henda sendingin fylgdi eini svenskari gentu, sum er ættleidd úr Iran, aftur til iransku familjuna. Hetta var kenslunemandi sending um tað at vera ættleidd, longsulin eftir at kenna sítt upphav, og hvussu torført tað er at koma til sættis við, at mamman gav barnið frá sær. Sendingin lýsti eisini stak væl munin millum tvær mentanir, har fatanin av tí einstaka er sera ymisk.

Tann seinna sendingin Alzheimers — Amandusa torføra val var um unga gentu, hvørs familja í fleiri ættarliðum (á ungum árum) var sera meint rakt av Alzheimer-sjúkuni. Amanda hevði møguleikan at kanna, um sjúkan fór at raka hana. Hon valdi at lata seg kanna, og kanningin staðfesti, at hon hevði arvað defektu íleguna frá mammu síni. Einasti uggin, læknin kundi geva henni, var vónin, at granskarar fóru at finna heilivág at basa sjúkuni, tá ið hennara tíð kom t.v.s. um eini 15 til 20 ár. Sendingin lýsti sera væl fyrimunir og vansar við íleguKanningum.

Framhaldssøgur og lýsingar, okkurt hissini var tó!

*Lydia Didriksen ummælir:*



## Hvat nú




## »Mítt vakra heim«




## Filmklassikeren: Psycho




## Agent 007 jages

